# Farmarutan í leysum lofti

**Farmarutan, sum Maersk Air hevur arbeitt við, verður helst av ongum fyribils, tí ov lítil áhugi er millum føroyska útflytarar at brúka hana**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Tað verður helst ikki enn, at flogið verður regluliga við fiski úr Føroyum. Til tess er áhugin í Føroyum ov lítil, sigur Maersk Air.

Tað var einaferð seinasta heyst, at tað kom fram, at Maersk Air hevði ætlanir um at stovna eina farmarutu loftvegis millum Føroyar og Danmark.

Hetta er gamal tanki, sum ofta hevur verið á lofti fyrr. Onkur roynd hevur eisini verið gjørd at flyta út loftvegis, men ongar stórvegis nøgdir er tað vorðið til kortini.

Og smáar nøgdir tykist júst at vera orsøkin til, at tað helst heldur ikki hesaferð verður til nakað.

Keld Moesgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, sigur, ætlanin fyribils er nakað langt úti í luftini, tí áhugin úr Føroyum er ov lítil

Tað er eingin trupulleiki at fylla eitt flogfar við farmi til Føroya. Men tað ber iki til at flúgva, um ikki verður fylt í báðar vegir. Og úr Føroyum fæst ikki nóg mikið av farmi til at fylla flogfarið. Tí verður hendan ætlanin ikki til nakað fyribils.



*Farmarutan, sum Maersk Air arbeiddi við, tykist ikki gerast til nakað, tí ongin áhugi er fyri henni í Føroyum*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Óregluligt

Fiskaútflytarar, Sosialurin hevur tosað við, halda, at ein orsøk til, at teir ikki vilja binda seg til nakra flogfarmarutu er, at tilfeingi er ov óregluligt.

Tað er soleiðis, sigur Petur Mohr, virkisleiðari á Norðís á Eiði, sigur, at har á virkinum hava tey arbeitt miðvíst við ætlanum um at flyta út við flogfari. Men tað vóru ov nóv ivamál til, at til bar at binda seg til nakað.

Hann sigur, at eingin hevur í grundini ráð at arbeiða upp á sikt. Og tá tosað verður um flogfrakt, verður beinanveg spurt, hvussu nógv tú kanst lata hvørja ferð. Og tá skal ein helst binda seg til eina fasta nøgd í longri tíð.

Men soleiðis ber illa til at arbeiða við fiski her hjá okkum. Tað eru í stóran mun veður og streymur, sum avgera, nær fiskur er at fáa til virkini. Verður hinvegin arbeitt til at frysta, fer tað sjálvandi av landinum við skipi, tí tað er nógv bíligari flutningur.

Annars hevur tað altíð verið, og fer helst eisini at verða so, at virkini loypa í millum ymsu framleiðslurnar, alt eftir hvat loysir seg best í løtuni.

Og tá so er, verður framleiðslan eisini har eftir og ov óstøðug til eina fasta flogrutu.

### Ov bíligur fiskur

Leivur Michelsen á Føroya Fiskavirking heldur, at tað loysir seg ikki at flyta fisk loftvegis úr Føroyum, tí meginparturin av tí, vit vanliga flyta út, er ov bílig vøra.

Upsan fæst stutt sagt ov lítið fyri, til at tað kann løna seg at flyta hann við flogfari. Nøgdirnar kundu annars fylt eitt flogfar.

Og so er tað hýsan. Hana hava tey á Fiskavirking roynt at flogið til Bretlands eina tíð herfyri. Men har vóru rættiliga nógvir tvørleikar á vegnum, so tað datt bara burtur aftur. Heldur ikki her var talan um tær stóru nøgdirnar. Vanliga var tað við Atlantsflogi til Glasgow, flogið varð, og tá var tað bara við tí, sum annars slapp í lastarúmið á ferðafólkaflogfarinum.

Og hóast hýsan er væl dýrari fiskur enn upsi, er hon eisini so mikið dýr at keypa inn til virkið, at ov lítið verður eftir til, at tað kann løna seg, um hon skal flytast loftvegis.

Vit mangla nøkur av teimum heilt dýru fiskasløgunum, sum bara verða seld í smáum nøgdum, um vit skulu fáa eina flogfarmarutu at bera seg, heldur Leivur Michelsen. Onkran tunfisk ella annað eksotiskt, øgiliga dýrt fiskaslag.

Kanska kundi talan verið um hummara og havtaskusporl og tílikt, sigur hann. Men vísir samstundis á, at sjóvegis flutningurin er so mikið álítandi, at tað heldur verður valt at senda tann vegin, tá tað bara verður avskipað einaferð um vikuna kortini.

### Ov stuttur vøllur

Og Kaj Leo Johannesen, stjóri á sølufelagnum Farex, er samdur við Leivi Michelsen. Men hann leggur aftrat, at vit eru ikki nóg væl útgjørd við flogvølli til at fara undir regluligan flogfarmaflutning.

Hann er samdur við teimum, sum halda, at vanligu fiskasløgini, vit flyta út, eru ov bílig til at ferðast so fínt sum við flogfari. Hann vendir aftur til hummaran og havtaskuna, sum kanska kunnu náa slíkum prísum, at tað ber seg at flyta smáar nøgdir út.

Men annars heldur hann ikki, at vit eru útgjørd við flogvølli, sum klárar at røkja eina regluliga flogfarmarutu við fiski úr Føroyum.

Flogvøllurin, vit hava, er ov stuttur. Tí noyðast vit at brúka smá flogfør, Og tey taka bara so mikið smáar nøgdir, at tað ber seg ikki.

So fyribils sær altso út til, halda bæði flogfelagið og fiskaútflytararnir, at ein flogfarmaruta millum Føroyar og Danmark fer at bíða.

# Nýggj tilboð frá Maersk Air

**Fyrsta mars eru 30 ár liðin, síðan Maersk Air, sum partur av Danair, byrjaði at flúgva til Føroya. Í tí sambandi fer Maersk Air at bjóða ferðaseðlar fyri sama prís, sum tá vóru galdandi**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Maersk Air fer í vár at selja ferðaseðlar fyri sama prís, sum galdandi var á rutuni millum Føroyar og Danmark fyri 30 árum síðan.

Í samband við, at tað eru liðin 30 ár, síðan Maersk Air kom upp í rutuflúgvingina til Føroya, fer felagið undir eitt átak, har prísirnir aftur fara at lække. Maersk Air hevur umsókn liggjandi hjá Vinnumálastýrinum um at sleppa at geva hesi tilboðini til ferðafólkini.

Keld Moesgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, sigur, at felagið hevur góðar royndir av tilboðsferðunum, felagið seldi á rutunum millum Føroyar og Danmark í fjør. Samlaða ferðafólkatalið hjá felagnum vaks við næstan 10.000 fólkum. Og tað gav felagnum eitt yvirskot á Føroyarutuni, sigur hann.

So tað er við góðum treysti, at farið verður undir aftur eitt nýtt átak í ár. Júst nær átakið byrjar, verður ikki sagt, tí enn verður bíðað eftir loyvi frá myndugleikunum til at fara undir átakið. Men Keld Moesgaard Christensen væntar, at tað bara verður ein avgreiðsluspurningur, sum hann tekur til.



*Hóast prísirnir verða teir somu sum fyri 30 árum síðani, verða tað heilt onnur flogfør enn tá, sum føroyingar sleppa at flúgva við*

### Føroyska manning

Rutustjórin hjá Maersk Air sigur, at felagið fegið vil hava føroyska manning at flúgva við flogførunum hjá Maersk Air. Bæði á Føroyarutunum og eisini aðrastaðni.

Søkt hevur verið eftir fólki í Føroyum, sigur Keld Moesgaard Christensen.

Hann sigur, at ætlanin er at fáa føroyingar í starv bæði sum kabinustarvsfólk og sum flogskiparar.

Fólkini fáa møguleika at sleppa í skúla og fáa útbúgving bæði sum flogternur og flogskiparar.

Keld Moesgaard Christensen dylur ikki fyri, at umdømið hjá Maersk Air eina tíð var fallandi í Føroyum, og tað, at teir nú fara at seta føroyingar í starv, er ein liður í ætlanunum um at koma nærri føroysku ferðafólkunum.

Hann ásannar eisini, at Maersk Air eina tíð helst gjørdi í so skjótt av við at avlýsa túrar til Føroya, tí flogførini skuldu brúkast aðrastaðni.

– Tann tíðin er farin, sigur rutustjórin hjá Maersk Air. Tað kann sjálvandi henda, at flogfarið ikki fær sett seg. Men so verður bíðað eftir betri líkindum. Avlýsingarnar fara ikki at veðra, sum tær onkuntíð vóru fyrr, sigur Keld Moesgaard Christensen.



# Nýggj framleiðsluhøll reist

**Fyri góðari viku síðani reisti virkið Injektor Door nýggja framleiðsluhøll í Vági.Virkið, ið framleiðir serstakar trollemmar, fær við hesum egin høli og betri umstøður**

ÍDNAÐUR
*Dagfinn Olsen*

Fríggjadagin varð nýggj framleiðsluhøll reist á Oyrunum í Vági. Tað er ikki á hvørjum degi, at slík høll verður reist og serstakliga ikki í útjaðara øki, sum hevur ment seg heldur seinni eftir kreppuna í 90'unum, enn meginøkið.

Fyri okkurt um trimum árum síðani fór Injektor Dorr við Helga Larsen á odda, undir at framleiða serligar trollemmar. Hesir eru nú kendir í Føroyum, og uttan fyri heimliga marknaðin, fyri sínar dygdir. M.a. eru lemmarnir orkusparandi, og slíkt er vælkomið, nú oljuprísirnir eru høgir.

Injektor Door hevur hildið til í gamla flakavirkinum, Polarfrost, har virkið hevur leigað frá Fiskavirking. Hølini eru ikki væl egnað til framleiðslu av stórum og tungum lutum.

Men á Oyrunum í Vági er víðkað um plássið og her stendur nýggja framleiðsluhøllin hjá Injektor Door. Hon er um 1000 fermetrar. Høllin er úr stálsperrum og skal eisini klæðast við stáli. Sperrur eru keyptar úr Danmark, men eisini hava teir á Injektor Door sjálvur framleitt.

Injektor Door framleiðir til heimamarknaðin, men eisini til útflutnings. Umleið 20 fólk arbeiða hjá Injektor Door.



*Tað er ikki á hvørjum degi, at nýggir virkisbygningar stinga seg upp í útjaðaranum. Nýggj framleiðsluhøll er reist í Vági. Tað er trollemmavirkið Injektor Door, sum við hesum sleppur úr leigaðum hølum og í egna høll*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Fólkaflokkurin keypt hús



*Í hesum húsununum í Jónas Broncksgøtu í Havn fer Fólkaflokkurin at halda til í framtíðini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Virksemi Fólkafloksins skal nú savnast í rúmligum húsum í Jónas Broncksgøtu í Havn. Flokkurin hevur keypt húsini frá Kommunala Starvs- og Tænastumannafelagnum**

HÚSAKEYP
*John Johannessen*

Í næstum flytir Dagblaðið og alt annað virksemi hjá Fólkaflokkinum í egin høli í Jónas Broncksgøtu í Havn.

Fólkaflokkurin hevur keypt rúmligu húsini hjá Kommunala Starvs- og Tænastumannafelagnum, og í løtuni verður arbeitt við at gera húsini klár at flyta inn í.

Meiningin var annars, at Fólkaflokkurin skuldi byggja hús Uppi í Svanga í Havn. Í fjør vár varð sett á at grava út fyri húsunum, men ætlanin varð slept, tí fólk mettu, at húsini lógu ov illa fyri.

Húsini, sum flokkurin hevur keypt í Jónas Broncksgøtu, eru rúmlig, og tí heldur floksleiðslan tey vera betur egnað, tá hugsað verður um, at tey liggja mitt í Havnini.

Steintór Jacobsen, sum vegna Fólkaflokkin varar av húsakeypinum, fegnast um, at flokkurin nú hevur fingið karmarnar til økt virksemi. Men hann leggur dent á, at tað ikki eru hølini, men fólkini í flokkinum, sum skapa virksemið.

# Væntar skolur frá suðuroyingum

**Tjóðveldisflokkurin skal um vikuskiftið hava ársfund um fólkaatkvøðuna og onnur mál, sum eru uppi í tíðini. Formaðurin roknar við nógvum atfinningum um útgerðarhavnina**

ÁRSFUNDUR
*John Johannessen*

Fólkaatkvøðan stendur sum høvuðsevni fyri ársfundin, sum Tjóðveldisflokkurin um vikuskiftið skal hava í Suðuroynni.

Men Høgni Hoydal, formaður floksins, roknar við, at handfaring floksins av málinum um oljuútgerðarhavnina eisini fer við drúgvari tíð.

– Meiningin við fundinum er at gera støðuna upp í ymsum málum. Fólk skulu sleppa at oysa út av posanum, tað sum liggur teimum á hjartað. Og eg ivist ikki í, at flokkurin fer at fáa nógv rís um útgerðarhavnina frá limum sínum úr Suðuroynni, men hetta er eisini uppiborið, sigur Høgni Hoydal.



*Formaður Tjóðveldisfloksin væntar sær nógvar skolur um úgerðarhavnina á fundinum í Øravík um vikuskiftið. Men hann heldur skolurnar vera uppibornar*

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum torir kortini ikki at lova, at skolurnar og uppskotini frá suðuroyingum koma at fáa nakrar beinleiðis avleiðingingar. Men hann staðfestir kortini, at nakað skal henda.

– Vit skulu halda okkum til løgtingssamtyktina, ið sigur, at virksemi skal vera í útjaðaranum. Og hvat virksemi, ið skal vera í Suðuroynni, skal politiski myndugleikin finna út av í næstum. Vit hava havt fund við Suðuroyar Oljuvinnuráð um hetta, og skulu í næstum hava fund aftur, sigur Høgni Hoydal.

Sosialurin skilir, at ætlanin er, at landsstýrið fer at krevja av tí útgerðarfelagnum, sum fær sáttmála við oljufeløgini, at tað skal leggja ein part av virkseminum í Suðuroynni, hóast oljuhavnin verður á Skálafjørðinum ella í Havn. Tað verður ikki hildið vera nóg mikið, at bert oljuforðingarnar vera í Suðuroynni.

Fundurin hjá Tjóðveldisflokkinum skal eisini leggja eina linju fyri politikk floksins í einum frælsum Føroyum. Fundurin byrjaði fríggjakvøldið og varir til sunnudagin.


Útsøla - Útsøla

Allar útsøluvørur ÷50%

Hesi stell selja vit út:
Pasadena · Cheyenne · Florens ÷50%
Hesi stell eru útgingin:
Green Park · Nanking ÷50%
Hesi bestikk selja vit út:
Hansiatic · Provence
Campus · Torpa ÷50%

Útsølan byrjar 29. januar kl. 9[00]

pf Maria Poulsen & Co.
FO 110 Tórshavn - Tlf. 31 20 00 og 31 20 01